VALGREINAR

# Aftursvar til Jóhan Carl Dam

**Kaj Leo Johannesen**
*løgtingslimu og valevni Smbandsfloksins í Suðurstreymi*



Eg haldi ikki, at vit skulu lata útlendska arbeiðsmegi ótálmaða slepp inn í land okkara. Tó skulu vit í ávísan mun hava hurðarnar opnar, á sama hátt sum føroyingar hava fingið loyvi til at arbeitt í eitt nú Íslandi í 50'unum og innan ríkið, nevniliga í Danmark fyrst í 90'unum.

Tað er eingin ivi um, at vit koma ikki at hava líkinda vørumenning, so leingi vit hava ein so vánaligan triðjalands status mótvegis ES.

Tað gongur sjón fyri søgn, at vit í løtuni eru í ferð við at avreiða alla okkara rávøru ella okkara arbeiðspláss til ES-virki, tí hugburðurin her heima er, at vit mugu ikki tosað ov nógv um hesi viðurskifti. Vit gera eftir mínum tykki alt ov lítið til tess at betra okkara marknaðarviðurskifti.

Havi sum sagt arbeitt við at keypt og selt fiskavørur bæði úr Føroyum og øðrum londum síðani 1989, men tað sær tíverri út til, at ávísir politikarir halda seg vita betur enn vinnulívið í Føroyum, tá talan er um ES. Tá er ringt at fáa optimalar loysnir.

Tað er soleiðis, at tá vit eru ein ráværu- og hálvfabrikataútvegari til ES-virki, so eru tað lønir og ráværuprísir- sum hava nógv at siga. Men um vit tordu at tosa um ES og fingið betri avtalur, so hevði lønarparturin ikki verið so týðandi sum hann er tað í dag, og vit høvdu kunnað tosað um at hækkað lønir, eftirsum lønarparturin í einari meira virðisøktari vøru ikki er so týðandi sum í einari sokallaðari "industrivøru".

Tann føroyska arbeiðsmegin er bæði røsk og mobil, um leiðslurnar klára at skapa eitt arbeiðsumhvørvi, sum elvir til "motiverað" starvsfólk. Eg havi ongantíð hildið, at vaskikonurnar hava ábyrgdina, um tað ikki gongur eftir vild, men einans "leiðsla og nevnd".

Vit mugu hava betri atgongd til ES-marknaðin. Hetta skal tó ikki skiljast soleiðis, at vit skulu innlimast í ES, men at vit skulu arbeiða fyri betri skipanum til okkara útflutning. Tað er ein gongd leið, so vit kunna hækka tímalønina hjá arbeiðsfólkinum, sum ikki hevur ov nógv frammanundan.

Um vit skulu hava eitt framkomið vitanarsamfelag, so meti eg at arbeiðstakarar, arbeiðsgevarar og politikarar eiga at tosa um, hvussu framtíðin fyri føroysku arbeiðsmegina skal skipast framyvir. Tað er ikki tímalønin hjá vanliga arbeiðaranum, sum ger Føroyar verri kappingarførar. Lat tað verða sligið fast við sjey tumma seymi!

Nú kennast vit báðir, Jóhan Carl, so lat meg sum vanligt siga tað beint fram: Eg vil altíð arbeiða fyri, at lønirnar í Føroyum eru fult á hædd við lønirnar í okkara grannalondum. Møguliga kann eg gera ávirkan mína galdandi, innan ikki alt ov langa tíð.

# Krøv mugu setast til givin loyvir!

**Dánial Petur Hansen**
*Valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum í Eysturoy*



Alivinnan hevur ein sera týðandi leiklut fyri tað føroyska samfelagið - ikki minst Eysturoynna, og er sjálvstýrisflokkurin sannførdur um at soleiðis verður eisini í framtíðini.

Men hendan framtíðin kemur ikki av sær sjálvum.

Stórar avbjóðingarnar, mugu loysast NÚ, soleiðis at tann føroyska alivinnan kann fáa teir neyðugu og støðugu karmarnar hon hevur krav uppá. Eins og Føroya fólk eftir 20 januar hevur krav uppá eina nýggja byrjan.

Tað eru fýra høvuðstrupulleikar í alivinnuni:

Prísirnir eru ov lágir
Vit hava ILA at stríðast við
Ov lítil atgongd er til kapital
Og spurningurin umVeð í loyvum

Prísirnar kunnu vit ikki gera nakað við.

ILA kunnu vit gera nakað við. Kunngerðir, ið áleggja neyðugar fyriskipanir eru nú lýstar.

Heldur enn at seta avmarkingar til kapitalin eiga vit at lata ávísar skyldur fylgja við givnum aliloyvum.

Staðfest er við dómi, at aliloyvi kunnu setast í veð. Hesin rættur skal staðfestast í lóg fyri at eingin ivi skal valda.

Vinnulívið hevur brúk fyri umboðum í løgtingi og landsstýri, ið kunnu handla.

Ein nýggj og virkin byrjan við Sjálvstýrisflokkinum er tann gongda leiðin. Gott val!

# Ábyrgdarfullur vinnupolitikkur støði undir samfelagnum

**Bjørn Kalsø**
*valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum*



Við skilagóðum ábyrgdarfullum vinnupolitikki, har atlit til livilíkindini hjá fólkinum koma í fyrstu røð, fer Sambandsflokkurin at byggja land eftir valið.

Sambandsflokkurin fer ikki av berum stoltleika at frásiga sær tryggar inntøkur, ella at høgga samfelagsbremsurnar í, soleiðis at hjólini steðga og verandi førningurin fer framav. Í tíðum við afturgongd í búskapinum, er umráðandi, at landið er væl fyri, so íløgur kunnu gerast , fyri at tryggja stabilitet í samfelagnum.

Vit hava síðan kreppan hasaði av mitt í 90-unum verið vitni til størstu uppgangstíðir í føroyskari søgu. Havið hevur verið fult av fiski, góðir fiskaprísir, rímiligir orkuprísir og metlágt rentustøði. Alt umstøður ein bert torir at droyma um, umstøður, sum um rætt var stýrt, átti at havt tryggja okkara landi og fólki sámulig livikor nógv ár fram. Men tíverri tykist veruleikin at vera ein annar, nú vandatekin í búskaparligu gongdini koma í ljósmála.

Skal trygd fáast fyri, at vánaligu útlitini í búskapargongdini ikki sleppa at svølla til eina veruliga kreppu, er neyðugt við dirvi og hugflogi, sum kann venda skeivu gongdini. Kappingaravlagandi bindingar í vinnupolitikkinum skulu burtur, og lógir og reglur, sum eru við at dýrka vinnutólini óneyðugt, mugu broytast. Skatta og avgjaldspolitikkurin skal eisini libiraliserast. Tað skal aftur loysa seg at arbeiða. Trýstið á lønarvøksturin fer hervið at lækka, og kappingarførið í vinnuni verður betur.

Føroyskt vinnulív er ógvuliga sárbært, tí tað stórt sæð bara er tengt at fiskivinnuni, kann vinnan, sum er ikki einsamøll halda samfelagshjólinum malandi. Ríkisveitingin, sum framvegis er ein ógvuliga stórur og týðandi partur av føroyska búskapinum, kann tí ikki skerjast meir í komandi valskeiði. Serliga ikki um skerjingin verður framd av berum stoltleika. Skal ríkisveitingin skerjast, mugu aðrar inntøkur finnast ístaðin, inntøkur, sum framhaldandi kunnu tryggja vælferðarsamfelagið, sum vit øll innast inni ynskja at varðveita.

Sambandsflokkurin fer ikki, soleiðis sum hinir flokkarnir ofta fara fram, bara at høgga sparibremsuna í eftir valið, við tí úrsliti, at verandi førningur fer framav. Men sambandsflokkurin fer við neyðugum skerjingum í almennum umsitingini og skilagóðum íløgupolitikki, at royna at forða fyri, at aktiviteturin í samfelagnum fellur ov nógv, serliga í økjum har aktiviteturin í vinnuni minkar. Skal vinnuføra fólkið í landinum støðast, má arbeiðsloysi haldast niðri.

Einasta boð, skulu vit droyma um eina bjarta framtíð eftir valið 20. januar, fæst við at velja Sambandsflokkin. Tað prógvaði flokkurin, tá hann vendi skeivu gongdini í kreppuni í 90-unum. Farið tí á val hesaferð og veljið Sambandsflokkin.

# Flogvøllurin skal útbyggjast!!

**Jóanis Nielsen**
*valevni Fólkafloksins í Vágum*
*www.joanisnielsen.fo*



Øll eru samd um, at neyðugt er at útbyggja flogvøllin, somuleiðis er alneyðugt at útbyggja terminalin. Spurningurin er bara hvussu tað skal gerast - og hvør ið skal gjalda?? Onkur tvíheldur um, at danir eiga at gjalda fyri útbyggingina, ímeðan onnur halda at danir og føroyingar skulu gera hetta í felag.

Løgmaður og forsætisráðharrin fundast.

Løgmaður, hevur havt henda spurning uppi at venda, fleiri ferðir við danska forsetissráðharran, sagt verður at teir nú eru samdir, um hvussu hetta skal gerast.

**Allir partar við.**
Vit halda at tað ræður um, ikki at leypa framav - tí øll viðurskifti mugu verða í lagi, áðrenn ætlanin verður framd, og tí mugu allir partar, sum hava við flogferðsluna at gera, vera við.

**200 metrar møguliga nokk??**
Á veljarafundi á Giljanesi í kvøld, kom flogskiparin á E-listanum inn á, hvussu langur vøllurin eigur at gerast - hann segði at um 200 metrar verða bygdir uppí vøllin, so metti hann, at vøllurin var tipp-topp. - Men tað skal sjálvandi eisini fáast skil á,um soleiðis er.

**Hóvliga leiðin hjá løgmanni - gevur úrslit.**
Ásannast má, at tann hóvliga leiðin, sum løgmaður altíð hevur víst á, er tann einasta leiðin til semju. - "Fram kemur tann í hóvliga fer".

Borgan fyri framhaldandi menning í VÁGUM
X - Fólkaflokkurin



VALGREINAR

# Familju- og heilsumál í 17 mánaðir

**Bill Justinussen**
*landsstýrismaður og valevni Miðfloksins í Eysturoy*
*Bill.teletech.fo*



**Familjupolitikkur**
Miðflokkurin lovaði til seinasta val, at vit vildu arbeiða fyri at fáa familjupolitikkin í miðdepilin við m.a. at stovna eitt Familju- og trivnaðarmálaráð. Hetta vallyftið var sera ítøkiligt, og tað megnaðu vit at halda. Sostatt kom familjupolitikkurin í nógv størri mun enn áður at gerast eitt afturvendandi politiskt kjakevni í Føroyum. Ætlanir okkara á familjupolitiska økinum skuldu ikki allar vera framdar eftir 17 mánaðum, tí slíkur politikkur tekur langa tíð at byggja upp. Fyrst má grundarlagið leggjast, og tað gjørdu vit við at fáa eina játtan á fíggjarlógina, sum eitur "familjuøkið" og eina aðra, sum eitur "trivnaðarkanningar". Vit hava sostatt bert arbeitt við familjupolitikkinum í eitt lítið ár, tí einasta fíggjarlógin, sum hendan samgongan gjørdi, var fyri 2003. Vit hava tí í 2003 skipað fyri nógvum fundum, sum skuldu meiri ítøkiliggera okkara familjupolitisku ætlanir. Nakrar av hesum eru:

- At kanna og samanbera fíggjarligu og sosialu korini hjá familjum í Føroyum samanborið við familjur í okkara norðurlendsku grannalondum.
- At regluliga gera trivnaðarkanningar av trivnaðarstøðuni hjá føroyskum børnum í samband við trivnaðarátøk, fyri at fáa staðfest, um átøkini muna.
- At fáa skúlabørnum í eitt nú fyrsta, øðrum og triðja flokki í fólkaskúlanum ókeypis grønmeti, frukt og mjólk.
- At stuðla verkætlanum, sum bøta um almenna trivnaðin hjá børnum og ungum, eitt dømi kundi verið tiltakið hjá Havnar kommunu at fáa børnunum í Hoyvíkar skúla heitan døgverðamat í skúlanum.
- At kanna sosialu orsøkirnar til fosturtøkur, fyri at kunna seta á stovn nøktandi sosial tilboð.
- At fáa til vega vitan um trivnaðarstøðuna hjá sjófólki okkara, fyri at kunna vegleiða og bøta um teirra livikor.
- At samskipa tann føroyska familjupolitikkin, sum er spjaddur í allar ættir undir fleiri aðalráðum, eitt nú barsilsskipanina, rentustuðulsskipanina, barnafrádráttin, bústaðarpolitikkin, dagstovnaøkið, barnaverndarøkið, forsorgarøkið, familjurættarlóggávuna, skattalóggávuna osfr.

**Tey sálarsjúku**
Miðflokkurin lovaði til seinasta val, at vit vildu virka fyri at betra korini hjá teimum sálarsjúku. Hesum hava vit støðugt arbeitt við. Fyrst tók eg sum landsstýrismaður stig til, at álitið um heildarpsykiatri var lagt fyri tingið til aðalorðaskiftis. Síðani bardist eg fyri at fáa økt um játtanina á fíggjarlógini, so økispsykiatriin kundi setast í verk eftir tilmælunum í álitinum. Eisini hevði eg ætlanir um í 2005 at raðfesta langtíðarløgujáttanina soleiðis, at psykiatriski depilin fekk pening til neyðugar ábøtur og umbyggingar. Síðani novembber 2003 er sosialpsykiatriin eisini flutt undir familju- og heilsumál, og vóru ætlanirnar at keypa hús til bústaðir til sálarsjúk í Eysturoynni og Klaksvík í fyrsta umfari, samstundis sum ætlanin var at endurstovna virknisdeildina fyri sinnisveik.

**Kommunulæknaskipanin**
Fyri at bøta um afturúrsigldu kommunulæknaskipanina, hevur verið arbeitt við fleiri møguligum loysnum. Í sambandi við, at nýggi bygningurin við landssjúkrahúsið verður tikin í nýtslu, hevur ein bólkur mannaður við embætisfólki og kommunulæknum v.m. arbeitt við eini vaktarverkætlan, sum miðar eftir at broyta vaktarskipanina hjá kommunulæknunum. Høvuðstankin er, at skipanin verður samskipað, so færri læknar sita á vakt kring landið um næturnar, tá lítið ella onki er at gera, fyri at vera tøkir í dagtímunum. Í fyrsta umfari skuldi skipanin galda fyri meginøkið, og síðani útbyggjast, um áhugi verður fyri tí.

Trupulleikin í Sandoynni sær út til at vera loystur ið hvussu er fyri eina tíð, samstundis sum ein loysn eisini sær út til at nærkast fyri Norðoyggjar.

Harumframt eru fleiri pengar settir av í verandi fíggjarlóg, so fleiri kunnu útbúgvast til kommunulækna. Um eini 2-3 ár verður væntandi tilgongdin av nýggjum læknum eins stór og væntaða fráfallið vegna aldur.

Og so er eisini eitt ætlan gjørd fyri eina seniorskipan, sum leggur upp til, at tað skal vera møguligt hjá teimum aldrandi læknunum at kunna arbeiða meiri eftir egnum ynski og tørvi, so sum tað ber til at samskipa tað.

**Nýggi bygningurin við Landssjúkrahúsið**
At fáa til vega neyðuga peningajáttan til eina so stóra og umfatandi bygging, er ein stór uppgáva. Ynskini frá ymsu landsstýrisøkjunum eru mong, og tí verður tað altíð ein telving og ein raðfesting at fáa til vega tann neyðuga peningin á fíggjarlógini. Hesa bygging havi eg sum landsstýrismaður raðfest ovarlaga, so sjúkrahúsverkið kann fáa betri karmar at virka í. At sita við ábyrgdini av hesi bygging og royna at stýra skútuni trygd heim, kemur ikki av sær sjálvum. Vit sóu, hvussu langt, langt við síðuna av, kostnaðarmetingarnar av tinghúsinum vóru, og tá er tað nærum eitt undur, at fíggjarætlanin fyri bygningin við landssjúkrahúsið hevur hildið so fyrimyndarliga. Her hava mong skilagóð fólk gjørt eitt megnar arbeiði.

**Nýggj IKA-heilsuskipan**
Tíverri er føroyska heilsuverkið afturútsiglt viðv. teldutøkni. Nógvar teldur eru, men tær samskifta ikki og onki felags kervi finst, har øll kunnu flyta upplýsingar sínamillum. IKA-heilsuskipanin (IKA= Integreret Klinisk Arbejdsplads) er komin væl áleiðis, og væntandi verða fyrstu partarnir av henni settir í verk seinni í hesum árinum. Hendan skipan ger tað møguligt at stýra virkseminum í heilsuverkinum munandi tryggari og effektivari. Skipanin ger tað møguligt at samskifta um sjúklingaupplýsingar frá kommunulækna til ymsu økini á sjúkrahúsunum og hinvegin, at stýra innleggingum og viðgerðum, at stýra bíðilistum og hava dagførd yvirlit hesum viðvíkjandi, at fáa til vega dagførd hagtøl osfr. Ymsu økini so sum rannsóknarstova, røntgen, deplarnir, sjúkrahúsini, kommunulæknarnir og sjúkrahús uttanlands koma øll at kunna samskifta á sama máli og í somu skipan, og pappírsleparnir hvørva. Trygdin er í hásæti, og er trygdin størsta orsøkin til, at hetta arbeiðið tekur langa tíð.

Sum landsstýrismaður havi eg givið umsitingini boð um at fáa til vega hesa skipan og havi samstundis fingið samgonguna at avseta 5 mió. á fíggjarlógini sum hvarv til hetta økið. Hendan skipan kann møguliga fáast við høvd og gørnum fyri 20-25 mió.

**Skúlalæknaskipanin**
Í mong ár hevur ongin skúlalæknaskipan verið mangastaðni í Føroyum. Altso fáa børn í Føroyum ikki eins tilboð frá tí almenna, og tað er ikki rætt. Øll eru eins fyri lógini, og tí eiga heilsutilboð at galda øll og ikki bert nøkur útvald. Tí havi eg sum landsstýrismaðurin gjørt eitt uppskot til nýggja landsskúlalæknaskipan. Uppskotið hevur nú verið til hoyringar hjá nógvum pørtum, og eru viðmerkingarnar sum heild jaligar. Flestu viðmerkingar eru tiknar til eftirtektar og innarbeiddar í lógaruppskotið. Spell, at samgongan ikki helt 14 dagar afturat, so varð uppskotið framlagt. Tankin er, at ein skúlalækni fyri alt landið við tíðini gerst sannur serfrøðingur á økinum, og á tann hátt kemur at vera ein myndugleiki, sum tørvur er á. Ætlanin er eisini, at hann á hvørjum ári skal gera frágreiðing um heilsustøðuna hjá børnum og geva tilmæli um generell átøk. Nógvir møguleikar fyri betraðari fólkaheilsu liggja í hesi skipan, vit síggja neyvan allar, fyrrenn skipanin hevur virkað í eina tíð.

Eisini her var peningur settur av á fíggjarlógini fyri næsta ár.

**Fyribyrging og fólkaheilsa**
Fyri at geva fyribyrgingarpolitikkinum eitt skump frameftir, varð á heysti 2002 skipað fyri einum stórfundi, har øll hugsandi við áhuga fyri fyribyrging vórðu boðin at luttaka. Hesin fundur var byrjanin til økt virksemi á fyribyrgingarøkinum. Neyðugt er at gera átøk fólkaheilsuni at frama, tí broyttir lívsvanar fara sum heild illa við heilsu okkara og talið av vælferðarsjúkum økist alsamt. Tí er fólkaheilsa eitt politiskt stórmál. Ætlanirnar á hesum økinum hanga neyvt saman við ætlanum um trivnaðarkanningar. Ráð skuldu mannast undir Fyribyrgingarráðnum, sum skuldu skipa fyri hesum kanningum, greina tær og gera niðurstøður. Síðani skuldi tann vitanin vera grundarlag undir langtíðarmálsetningum fyri fólkaheilsuni. Eisini undir ítøkiligum átøkum fólkaheilsuni at frama. Grønu keksirnar vóru bert ein lítil og forhastaður partur av fólkaheilsupolitikkinum, tí tá fíggjarlóg skal gerast, ber ikki til at bíða eftir hesum og hasum. Men fyri at fáa hendan partin við, noyddust vit at framskunda hann til fíggjarlógarviðgerðina.

Eitt gott samskifti var fingið í lag við Mentamálaráðið, tí tað er í skúlunum, at verulig tøk kunnu takast fyri fólkaheilsuna. Tíverri hevur samskiftið millum heilsumyndugleikar og skúlamyndugleikar ikki verið nóg nógv. Heilsumyndugleikarnir eiga í størri mun at vera við í skúlans virksemi við sínum heilsufakliga førleika.

**Samskipan av heilsuverkinum**
Heilsuverkið er alt ov illa samskipað. Ein brokksjúklingur kann sakstans ganga eitt hálvt ár og bíða eftir skurðviðgerð á landssjúkrahúsinum, meðan Suðuroyar og Klaksvíkar sjúkrahús onga bíðirøð hava á hesum øki. Hví ikki senda sjúklingarnar á bíðilista til Klaksvíkar ella Tvøroyrar. Sjúkrahúsini virka ov nógv hvørt í sínum lagi. Felags leiðsla og funktiónsberani eindir eru helst betra loysnin. Og kanska enntá kontraktstýring á ávísum økjum.

Øllum hesum situr ein bólkur og leggur síðstu hond á í hesum døgum. Tað tilmælið verður helst grundarlag hjá komandi landsstýri fyri einum betri samskipaðum heilsuverki.

**Sjúkrabilarnir**
Javnan hava vit hoyrt um vána støðuna viðvíkjandi sjúkrabilunum. Men her er vend komin í. Støðan í dag er betri enn nakrantíð, nú meiri enn helvtin av bilunum eru yngri enn 2 ár. Eysturoyggin hevur nú altíð nýggjan sjúkrabil, tí hevur verður koyrt nógv mest, einir 10.000 km. um mánaðin. Skipanin er tann, at tá bilurin í Eysturoynni er 1-2 ára gamal, verður hann settur inn í annað øki, og nýggjur bilur í Eysturoynna. Sjúkrabilurin saman við kommunulæknunum eru okkara sjúkrahús, og tí er lívsneyðugt, at hesar umstøðurnar eru fyrsta floks. Og tað kunnu vit eysturoyingar fegnast um, at tær eru.

**Ílegugranskingin**
Ílegugranskingin fekk ein frammaná fyri nøkrum árum síðani. Landsstýrismaður Miðfloksins hevur síðani leitað uppskotið framaftur og hevur broytt tað munandi, so tað samsvarar betri teimum viðmerkingum, sum tá vóru at hoyra. Nú er uppskotið klárt at leggja fram til nýggja politiska viðgerð, og verður tað eitt mál hjá Miðflokkinum til komandi samgongusamráðingar. Her liggja ókendir møguleikar bæði fyri at finna fram til sjúkuorsøkir og harvið at finna fram til nýggjar viðgerðarhættir og heilivág, og um tað kemur hartil, kann eisini henda, at ílegugranskingin verður ein týðandi inntøkukelda fyri føroyska samfelagið. Uttan mun til, um úrslit spyrjast burturúr tann vegin, er í øllum førum víst, at eitt granskingarumhvørvi dregur serlæknar til landið og mennir munandi um fakliga umhvørvið í Føroyum.

**Bústaðarpolitikkur**
Góður bústaður til øll er týðandi partur av familjupolitikkinum. Men tað eru alt fleiri í samfelagnum, sum ikki hava møguleika at seta búgv ella fáa tann bústað, sum tey helstu vilja hava. Tí tóku landsstýrismaður Miðfloksins, sum umsitur bústaðarmál, og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum stig til at gera eina frágreiðing um alternativar bústaðarmøguleikar. Hendan frágreiðing er nú grundarlag undir ætlanum landsstýrismansins at smíða lóg um alternativar bústaðarbygging. Húsalánsgrunnurin verður almenna amboðið til at fremja hendan politikk.

Íbúðarlutafeløg er nýtt fyribrigdi. Hesin eigarahátturin kemur at gera tað møguligt hjá unga og eldri at fáa egið tak yvir høvdið fyri munandi minni og bíligari kostnað enn tey tilboð, sum eru á marknaðinum ídag.

Eisini er málsøki leigulóg nú lagt undir Familju- og Heilsumálaráðið og er ætlanin at skipa leigumarknaðin við lóg.

**Framstig í samgongutíðarskeiðnum, sum Miðflokkurin eisini eigur lut í:**

- Berghol Øravík/Hov, lóg gjørd og peningur settur av
- Skattalættar í 2003 og 2004 fyri tilsamans 127 mió. kr.
- Nýggj Smyril
- Ferjuhavn á Drelnesi
- Vágatunnilin
- Norðoyatunnilin
- Skúladepil við Marknagil

*Framhald á næstu síðu*